# Heiðurskonsertir fyri Bob Marley

**Um Bob Marley hevði livað, hevði hann fylt 58 ár í dag. Aftur í ár verður fyri 22. Ferð skipað fyri árliga reggae festivalinum til heiðurs fyri manninum, ið gjørdi reggae tónleikin kendan.**

RAGGAE
*Annika S. Olsen*

Tónleikarin og politiski aktivisturin Bob Marley var føddur 6. februar 1945. Sum sonur av einum miðaldrandi hvítum manni og eini ungari, svartari mammu vaks Bob Marley upp fátækur í býnum Trenchtown í Jamaica. Hann byrjaði at syngja og spæla saman við tveimum øðrum vinmonnum sum 16 ára gamal. Tað var tó fyrst í 70'unum, at Bob Marley saman við The Wailers veruliga gjørdi um seg. Fløgan "Catch a Fire" setti fyri fyrstu ferð reggae-tónleikin á heimsmarknaðin, og gjørdist reggae tónleikurin tá sera vælumtóktur. Seinni komu fløgurnar Natty Dread, Rastaman Vibration og Exodus við kendum løgum so sum "No Woman, No Cry", "Jamming" og "Exodus".

Bob Marley hevur altíð verið kendur fyri sínar sangtekstir, Ið eisini klárt vísa hansara politisku sjónarmið. Bob Marley legði stóran dent á frælsi. Sum persónur var hann sera fríur, og vildi hann eisini, at øll onnur fólk áttu at liva í frælsi.

Í 1977 løgdu læknar til merkis, at Marley ikki hevði tað so gott. Teir funnu krabbameinskyknur. Marley vildi tó ikki hava viðgerð. Í 1980 funnu læknar út av, at krabbameini hevði breitt seg til heila, lungu og livur. Fráliki tónleikarin og uppreistrarmaðurin andaðist í 1981.

### Aðrir tónleikarar vísa virðing

Líka síðan Bob Marley læt lív hevur verið heiðursfestivalur fyri honum á hvørjum ári við ymsum reggae-tónleikarum. Í ár er ikki nakað undantak, og fara konsertirnar hesaferð at hava vitjan av millum øðrum Sean Paul, Shaggy, Buju Banton og Steel Pulse. Synirnir hjá Bob Marley, Stephen, Damian og Julian verða eisini at hoyra á konsertunum, sum byrjað 15. februar í Long Beach, Kalifornia.



*Sum persónur var Bob Marley sera fríur, og vildi hann eisini, at øll onnur fólk áttu at liva í frælsi*

# Ung í MáF 2003

**Í 1999 steðgaði nevndin í Ung í MáF. Eftir steðg í 3 ár, hava fólk nú aftur tikið seg saman og gjørt eina nýggja nevnd. Í nýggju, frísku nevndini eru ung fólk millum 18 og 24 ár, og hava tey sett eina skrá fyri 2003**

SJÓNLEIKARAR
*Annika S. Olsen*

Ung í MáF er ungdómsfelagsskapurin undir Meginfelag Áhugaleikara Føroya, og er fyri sjónleikaáhugaði ung millum 15-25 ár.

Í nýggju skránni hjá Ung í MáF stendur at lesa um nógv ymiskt spennandi. Í fyrru helvt av 2003 fer Ung í MáF at skipa fyri fýra tiltøkum í Føroyum.

Tað fyrsta tiltakið verður vikuskiftið, 21.-23. mars. Tá verður stór stevna á Sandi. Heili 50 limir í Ung í MáF kunnu luttaka á stevnuni, sum fer at leggja serligan dent á sjónleik og stuttleika.

Í apríl 2003 fara tey væntandi at skipa fyri ljósdesignaraskeiði í páskafríðini, og vikuskiftið 25.-27. apríl verður skeið í "stage-fight". Har kunnu sjónleikaáhugaði læra um bardaga á palli. Skeiðið verður í Klaksvík.

Í 17. mai verður barnasjónleikarastevna í Havn, har allir skúlar eru bodnir við.

Ung í MáF hevur ætlanir um útnorðurskeið vesturi í Vágum í juli. Ætlanin er at lærarar skulu koma úr Grønlandi, Íslandi og Føroyum

Ymisk norðurlendsk tiltøk eru eisini til boðið, hjá sjónleikaáhugaðum føroyingum at luttaka á. T. d. summarskúlin hjá NUTU, har 15-25 ára gomul sleppa at luttaka, og læra nakað nýtt innan sjónleik og drama.

### Gerst limur

Fyri at luttaka í flestu av hesum tiltøkunum, skal ein vera limur í Ung í MáF. Um áhugi er til tess, skal ein bert seta seg í samband við Ung í MáF ella fáa fatur á skránni, har tilmeldingarblað er í. Limagjaldið er 50 kr um árið.


Betri tænasta til okkara vinnukundar.



Jógvan Jóhan Petur Lennard



- Øll vanlig eftirlit verða ókeypis næstu fýra árini ella upp til koyrdar 100.000 km., tað vil siga fyrstu koyrdar km. 25.000, 50.000, 75.000 og 100.000.
- Møguleiki skal verða fyri at fáa eftirlit, oljuskift og dekkskifti gjørt mikukvøld, soleiðis at bilurin er klárur aftur hósmorgun.
- 20% í avsláttri uppá allar eykalutir, dekkkeyp og oljuskift.
- Í samband við dekkskifti fáa tygum møguleika fyri at goyma reserva-dekkini á okkara nýggja dekkhotellið.

Ford

P/F Wenzel

Tað loysir seg at verða vinnukundi hjá okkum.

www.wenzel.fo, Akranesgøta 5, tlf. 354500.




# Sumbingar hava eftirmett støðuna

**Seinastu tríggjar vikurnar eru eini hús brend í grund í Sumba og eini onnur eru rættiliga illa farin av eldi. Tað hevur fingið sumbingar at tosa um støðuna**

ELDSLØKKING
*Áki Bertholdsen*

**Sumba:** Seinastu tríggjar vikurnar hava sumbingar av røættum sanna gamla orðataki um, at eldur er góður tænari men ringur harri.

Uppá tríggjar vikur eru eini hús í bygdini rættiliga illa farin av eldi og eini onnur eru brend í grund.

Hetta hevur fingið sumbingar at taka støðuna við tilbúgving og eldsløkking upp og nú eitt kvøldið høvdu teir fund í Sumba, har støðan varð eftirmett.

Dánjal Johan Lisberg, sum tók stig til fundin, sigur, at ætlanin við fundinum var einans at gera støðuna upp og at vita, um tað ikki ber til at fyrireika seg betri til slíkar støður.

Tó leggur hann afturat, at sama hvat varð gjørt, nú eldur var í seinast í Sumba, høvdu húsini ikki staðið til at bjarga, tí tey stóðu í ljósum loga, tá ið fólk komu á staðið.



*Í farnu viku brendu hesi húsini í Sumba í grund og fyri trimum vikum síðani fóru eini onnur hús í Sumba rættiliga illa av eldi. Tað hevur fingið sumbingar at taka støðuna upp*

Við á fundinum vóru sumbingar, sløkkiliðsmenn úr Vági løgregla og bygdaráðslimir.

Annars eru ongir sløkkiliðsmenn í Sumba. Tað eru valdir nakrir sløkkiliðsmenn fyri einum 20 árum síðani, men tað er ongantíð fylgt upp við skeiðum og útbúgvingum. Úrslitið er, at tað er bara ein sumbingar, sum hevur skeið í at sløkkja eld og tað er ein maður, sum kommunan hevur sent á skeið.

Annars hevur alarmsentralurin ein lista við nøkrum sumbingum á, sum ringjast kann til í slíkum førum.

– Men í hvørgum førum, eldur hevur verið í hesar seinastu ferðina, tríggjar vikurnar, fekk nakar sumbingur boð um eldin.

Tann einasti, sum fekk boð, var ein arbeiðsformaður hjá kommununi, sum fekk boð av tilvild.

Hetta er ein maður, sum um hendi hevur útgerðina, sum kommunan eigur.

Stigtakarin til fundin sigur, at eitt úrslit av fundinum var, at sløkkiliðið í Vági skal fara runt bygdina við arbeiðsformanninum hjá kommununi at skráseta allar sløkkikranar í bygdini. Sløkkiliðið hevur frammanundan onki kort við sløkkikranum á. Tað er heldur ikki av nóg tætt ímillum sløkkikranarnar og arbeitt eigur at vera fyri at seta fleiri upp.

Ein niðurstøða av fundinum var eisini, at skipast eigur at vera fyri fleiri venjingum.

Annars hevur Sumbiar Bygdaráð samtykt at vera við til at keypa brandbil til suðuroyar syðru helvt. Kommunan hevur eisini havt ætlanir um at senda fólk á skeið. Ætlanin er eisini at keypa roykkavaraútgerð.

Annars sigur Dánjal Johan Lisberg, at samstarvið ímillum teir, sum vóru við í sløkkiarbeiðnum í Sumba, gekk fyrimyndarligt, hóast teir ikki høvdu vant saman frammanundan.

# Ætla at keypa brandbil í felag

**Í syðru helvt í Suðuroy ætla tey at gera seg betri út til at sløkkja eld**

ELDSLØKKING
*Áki Bertholdsen*

**Suðuroy:** Tær fýra kommunurnar í syðru helvt í Suðuroy ætla nú at brynja seg betri út til at basa eldi.

Sløkkiliðið í Vági, sum er fyri alla suðuroyar syðru helvt, arbeiðir tískil við ætlanum um at keypa ein nýggjan brandbil.

Í tí sambandi hevur sløkkiliðið teir spurt kommunurnar í suðuroyar syðru helvt, um tær vilja vera við til at stuðla keypinum.

Í suðuroyar syðru helvt eru Sumbiar-, Vágs-, Porkeris og Hovs Kommuna og tað tykist sum um at undirtøka er fyri tí.

Tað skilst, at Sumbiar Kommuna hevur samtykt at vera við í keypinum.

Leygardagin var málið fyri í Hovs Kommunu og har varð eisini samtykt at vera við í keypinum.

Men Hovs Kommuna vil samstundis hava greiði á, hvussu nógv bilurin fer at kosta og, hvussu stórur parturin hjá Hovs Kommunu verður og hvussu parturin hjá hvørjari kommunu verður roknaður út.



*Bygdaráðið í Hovi hevði ársins fyrsta fund leygardagin og har varð samtykt at verða við til at keypa nýggjan brandbil til sløkkiliðið í Suðuroyar syðru helvt. Frá vinstru eru tey Delmar Tausen, Dagfríð Hovgaard, Jákup Petur Joensen, varaborgarstjóri, Emma Petersen, borgarstjóri og Alexius Midjord*

Sløkkiliðið í Vági sigur, at tey hava harðliga brúk fyri nýggjum brandbili. Tann, sum liðið hevur, er meiri enn 25 ára gamalur. Hann hevur hartil so lítlan motor, men tað allarmesta hann klárar eftir sløttum er 50-60 kilometrar um tíman og er eitt sindur av mótbrekku er skjótt, at hann fer niður á 40.

Annars verður sagt, at bilurin er góður- tá ið hann er komin á staðið. Men teir kundu hugsa sær ein bil, sum var nýggjari og sum hevði størri motor og sum kundi verið skjótt frammi.

### Eisini samstarv norðureftir

Annars eru tað ikki bara kommurnar í suðuroyar syðru helvt, sum eru áhugaðar í at samstarva við Hov um eldsløkking.

Hov er mitt í Suðuroynni og sløkkiliðið á Tvøroyri hevur eisini spurt seg fyri hjá Hovs Kommunu um samstarv í sambandi við venjingar, skeið o.sfr.

Á bygdaráðsfundinum í Hovi var niðurstøðan, at tað tóktist natúrligari fyri kommununa at samstarva við syðru helvt um sløkkiliðsútgerð.

Men kommunan hevði onki ímóti at samstarva um venjingar, skeið o.a. við sløkkiliðið í norðaru helvt, sum er Tvøroyrar-, Fámjins- og Hvalbiar Kommunu.

Ikki minst verður hesin spurningurin átrokandi, nú ætlanin er at fara undir Hovstunnilin seinni í ár.

Ikki minst skal greiða fáast á, hvør hevur ábyrgdina, tekur ein neyðstøða seg upp í tunlinum. Í tí sambandinum hevur bygdaráðið í Hovi fingið upplýst, at kommunurnar í syðru helvt koma at hava ábyrgdina av syðru helvt av tunlinum, sum kemur út omanfyri Hov, men at kommunurnar í norðaru helvt koma at hava ábyrgdina av norðaru helvtini av tunlinum, sum kemur út við Tjaldavík.

Annars eru hovbingar ikki so illa fyri hvat sløkkiliðið, tí fleiri mans hava verið á skeiði í roykkaving og eldsløkking og kommunan hevur í fleiri ár sent pening av til at útbúgva brandfólk við. Kommunan hevur eisini ein lítlan vogn við ymsari útgerð.

Men bygdaráðið heldur, at tað mest natúrliga hevði verið, um øll oyggin samstarvaðu um venjingar, skeið og annað, ikki minst nú Hovstunnilin verður gjørdur og tað verður so nógv styttri at koyra úr einum enda í annan.